## DAGSINS MEINING

# Samferðsla í Útnorði

Í farnu viku varð skipað fyri sera áhugaverdari ráðstevnu í Útnorðurráðnum. Evnið á fundinum var samferðslan í Útnorði. Hvussu er støðan í dag og hvussu kann hon betrast! Tað er gott, at skipað verður fyri slíkum kjakfundum og kundu teir gott verið uppaftur fleiri. Sanniliga er nógv at tosa um, tá tað um samstarv í Útnorði viðvíkur tvs. millum Føroyar, Ísland og Grønland.

Men samstarv av ymsum slag tað veri seg innan mentan, undirvísing, gransking, vinnu oa. byggir alt á ein felagsnevnara, og hann eitur samferðsla ella samband millum londini. Í hesum trimum londum búgva bert 400.000 fólk, men økið er nærum eins stórt sum alt Europa. Skal veruligt samstarv mennast, so merkir tað eisini, at samferðumøguleikarnir mugu koma meira í fokus. Tað er greitt, at skal nakað innihald vera í einum samstarvi og skal hetta mennast hvørs endamálið við Útnorðurráðnum er, so má grundarlagið vera til steðar og tað er hvussu vit fysiskt kunnu koma úr einum í eitt annað av hesum trimum londunum.

Og her er tað so flutningurin loftvegis og sjóvegis, sum er avgerandi. Her er bæði talan um, hvussu oftani tú kanst koma úr einum landi í eitt annað og hvussu nógv hetta kostar. Støðan í dag er tann, at vit hava trý flogfeløg, sum flyta fólk millum Føroyar og Ísland og millum Ísland og Grønland. Hesi feløg eru Atlantsflog, Flugfelag Íslands og Grønlandsfly. Sambandið millum Føroyar og Ísland er hampuliga gott men kundi helst verið flogið oftari. Men tað er millum Ísland og Grønland, at trupulleikin liggur. Her hevur verið betri samband áður men í dag er vánaligt flogsamband fyri so ikki at tosa um prísirnar. So trupuleikin í samferðsluni er bæði ov vánaligur týttleiki og ov høgir ferðaseðlaprísir. Flutningur er so eisini sjóvegis men hann er sera avmarkaður, tá tað um ferðafólk ræður. Her er Norrøna, sum tó er av alstórum týdningi fyri bæði menning av ferðavinnuni í londunum og fyri samferðsluna sum heild.

Á ráðstevnuni í Norðurlandahúsinum vóru røddir frammi um, at tað almenna eigur onkursvegna at koma inn ímyndina fyri at bøta um støðuna, soleiðis at flogfeløgini kunnu flúgva oftari og bíligari. Henrik Old, umboðið hjá Javnaðarflokkinum í Útnorður-ráðnum var rættiliga avgjørdur í hesum máli og metti, at skuldi nakað positivt henda, so mátti tað almenna uppí so ella so. Stjórin í Atlantsflog, Magni Arge lovaði at arbeiða við málinum og vildi kanna møguleikarnar fyri at betra umstøðurnar at ferðast millum londini í Útnorði.

Samanumtikið varð hetta ein góð ráðstevna men spell var tað, at eingir ráðharrar úr Íslandi ella Grønlandi luttóku, tó at fleiri parlamentarikarar vórðu úr teimum londunum eisini. Nú er bara at vóna, at hetta tiltakið fer at geva okkurt úrslit. Skal alt tosið um at fáa ment samvinnuna millum londini í Útnorði á nærum øllum hugsandi økjum gerast annað enn føgur orð, so má tað gerast lættari og bíligari at ferðast millum londini. Og kann hetta bert gerast við einum ella øðrum slagi av almennari luttøku, so eigur hetta at verða umhugsað, tí hetta má tá metast sum ein skilagóð íløga í framtíðina fyri bæði føroyingar, íslendingar og grønlendingar.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Borgarligur planbúskapur ella rein opportunisma

**Súsanna Dam**



Vanligt verður hildið, at prógvið fyri at menniskjað hevur vit og skil er, at tað lærir av royndum sínum og í mun til djórið kann forða fyri, at tey somu mistøkini verða gjørd uppaftur. Ætlanin um at býta Fiskavirking í smærri eindir er tó eitt talandi dømi um, at politikkarar ikki enn eru komnir á hetta høga menningarstig.

Eftir at teir høvdu býtt okkara fíggjarligu orku sundur í smábitar og latið hana til hvønn sum helst, uttan at hava nakra veruliga ætlan ella stýring við hesum, koppaði samfelagsbúskapurin sjálvandi. Sum eina roynd at endurreisa einastu inntøkukeldu okkara, varð stovnaður ein grunnur, við tí endamáli at bjarga tí, ið bjargast kundi og fáa gongd á aftur. Samstundis skuldi grunnurin verða trygdin fyri, at politikkarar ikki skuldu fáa høvi til at pilka við tilgongdina. Í staðin skuldi marknaðarkreftirnar sleppa at stýra royndunum at endurbyggja búskapin. Ikki kann annað sigast enn at endurreisingin heppnaðist sera væl. Beinanvegin politiska kannustoypaíið helt uppat, bar til at fáa eina lønandi vinnu. Men tíverri er sermerkt, at tá ein skipan virkar, so kann politiska valdið ikki bæra sær og leggur uppí, men hóast alt er tað løgið, at Fólkaflokkurin, teir sum siga seg verða trygdin fyri borgarliga hugtakinum, eru teir ídnastu til at innføra hitt planøkonomiska mórudíki aftur. Ella kanska er tað als ikki løgið?

Politikkarar, mest fólkaflokks-, ætla at býta Fiskavirking sundur og lata øðrum, sum ikki hava megnað at klára seg í fríu kappingini, burturav. Fyri at gera hurlivasan so stóran sum gjørligt, tvinna teir eina ætlaða einskiljing og ætlaða sundirbýtið saman, so kanska fólk flest ikki fata, hvat tað er, sum er við at henda.

Fjórðingurin av samlaðu veiðuni fer óvirkaður av landinum, vinningurin er ivasamur, og arbeiði uppi á landi nærum einki. Fiskavirking keypir, góðskar og selur ein góðan triðing av samlaðu veiðumongdini, er størsta arbeiðspláss í landinum, og hevur við dugna og ídni strevað seg til ein vinning uppá eini 20 procent. Tey 20 procentini eru ein rættiliga stórur partur av tí peningi, ið skal tryggja livistøði okkara, og tey koma ikki av sær sjálvum. Tað kunnu vist bert vera politikkarar, ið halda, at teir fáa meiri pening til at fíggja fullveldi við, um teir petta hesa eindina sundur og lata hana til onnur, sum ikki hava megna eins væl at laga seg til fríu kappingina. Kann tað bera til, at ein nostalgisk afturgongd til 80'ara moralin nú er um at taka seg upp?

# Bussleiðin "á det skil"

**Nemus Napoleon Djurhuus**



Her royna fleiri sum frægast at klára seg uttan bil - men býráðssamgongan saman við **Torfinn Smith**, (sum skuldi í samgongu fyri at fáa positiva ávirkan á gongdina, borgarinum at frama), roynir at fáa okkum at keypa bil. Hvat skulu vit billeysu gera leygardag eftir kl. 18.00 og **sunnudag**, tá als eingin koyring er, og vit ætla okkum frá **Norðastahorn** til **Inni á gøtu** ella av **Argjum** til **Kollafjarðar**.

Jú vit kunu sita heima og trilla tummilfingrar ella ringja til borgarstjóran og biðja hann koma at koyra okkum.

Nei nú er nokk - vit sum ikki hava bil finna okkum ikki í hesum. Um tit ætla at samtykkja **bussmálið** hósdagin, ja so fara vit sum ikki eiga bil og óiva nógv onnur at savna saman undirskriftir.

Andstøðan nú má berjast fyri okkum borgarar í Tórshavn og Kollafirði. Upp á barikadirnar.

PS: Latið heldur bussarnir koyra tríggjar ferðir um tíman mitt í viku, tá var bussleiðin eitt veruligt alternativ.


Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14:00

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




Kvinna við róðrið í Oljutinginum:

# Anni avloysir Ingvør



*Ikki færri enn tríggir av teimum fimm nevndarlimunum í Oljutinginum eru kvinnur. Nýggja nevndin fv. Ben Arabo, Anni á Hædd, Hjørdis Gaard, Elsa Maria Holm Olsen og Ólavur Gregersen*

*Mynd Finnur Justinussen*

**Bæði tann fyrsti og tann næsti formaðurin í mansdomineraða Oljutinginum eru kvinnur. Á aðalfundinum í farnu viku loysti Anni á Hædd av undanfarnu forkvinnuna Ingvør Nolsøe**

AÐALFUNDUR
*Jan Müller*

Hóast formaðurin í Oljutinginum seinastu árini hevur veirð ein kvinna, og hon bar seg undan afturvali á aðalfundinum mikukvøldið, so verður nýggi formaðurin framvegis ein kvinna. Ingvør Nolsøe verður avloyst av Anni á Hædd, sum skal stjórna Oljutinginum í eini tíð, har føroyingar helst fáa svarað spurninginum, um olja finst í lønandi nøgdum í undirgrundini.

Nýggja nevndin hjá Oljutinginum er nú mannað soleiðis:
Anni á Hædd, forkvinna
Ben Arabo, næstformaður
Elsa Maria Holm Olsen, skrivari
Hjørdis Gaard, kassameistari
Ólavur Gregersen, nevndarlimur

Anni á Hædd og Ben Arabo eru afturvald, meðan Elsa Maria Holm Olsen, Hjørdis Gaard og Òlavur Gregersen eru nývald. Ingvør Nolsøe, Alex Buvik og Sigurð í Jákupsstovu bóru seg undan afturvali.

Nakað av fólki møtti til aðalfundin hjá Oljutinginum. Áðrenn aðalfundin greiddi Gunnbjørn Joensen, stjóri í Thor í Hósvík frá sera áhugaverdu og fjølbroyttu søguni hjá P/F Thor sum veitari til føroyska og altjóða oljuvinnu. Hetta er ein sólskinssøga og dømi um, hvussu føroyingar kunnu og megna bert teir hava dirvi og vilja.

Ingvør Nolsøe hevur verið forkvinna í Oljutinginum, síðani tað varð stovnað fyri tveimum árum síðani. Tað mundi koma ávart á mangan mann, at eitt so mansdominerað yrki sum oljavinnan er tað, brádliga fekk eina kvinnu í oddasessin. Hesi tvey árini hevur Oljutingið skipað fyri fleiri spennandi tiltøkum, har serstøk evni við tilknýti til oljuvinnuna hava verið tikin upp, og har ymsir persónar í samfelagnum hava lagt fram sjónarmið síni.



*Ingvør Nolsøe, sum hevur stjórnað Oljutinginum í tvey ár, men sum nú letur leiðsluna víðari til Anni á Hædd*

*Mynd Finnur Justinussen*

### Spennandi tíð

- Hetta hevur verið ein sera spennandi tíð ikki minst hetta at fáa fólk, sum onkursvegna hava tilknýti til eina føroyska oljuvinnu at koma saman til ymisk tiltøk og so royna at gera tað eitt sindur sosialt eisini sigur Ingvør Nolsøe. Hon heldur tað er umráðandi at hava eitt forum har fólk úr øllum stættum í samfelagnum kunnu hittast bæði til kunnandi fundir og til hugnaløtur.

- Hetta er ikki ein innilæstur klubbi fyri serstakar persónar men eitt stað, har øll við áhuga fyri oljuvinnuni kunnu vera limir. Kunning um oljuvinnuna og ein uppfylgjandi diologur eru nøkur av teimum mest týðandi lyklaorðunum nú vit skulu til at leggja til brots í hesi fyri okkum heilt nýggju og spennandi vinnuni heldur Ingvør Nolsøe. Hon heldur eisini, at Oljutingið kann vera av týdningi sum eitt sokallað tankating. Men tað hevur eisini nógv at siga at kunna skapa álit millum fólk í hesi vinnu og sum á ein ella annan hátt hava tilknýti til vinnuna. Tí kann Oljutingið hava týdning fyri okkum øll sum frálíður.

Ingvør Nolsøe sigur, at hetta hava verið tvey sera áhugaverd og gevandi ár sum forkvinna í Oljutinginum. Ikki minst hevur hon verið serstakliga fegin um at kunna samstarva við Alex Buvik og Geir Atle, báðir útlendingar í føroysku oljuvinnuni.

Í dag eru 175 limir í Oljutinginum, 60 feløg og 115 einstaklingar.



*Frá aðalfundinum í Oljutinginum*

*Mynd Finnur Justinussen*